# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Danmark er komið í spennandi bólk




*Danir hava roynt at fyrireika seg væl til HM-endaspælið. Her sæst Michael V. Knudsen í dysti móti Rumenia í fyralandakapping herfyri*
*Mynd: Polfoto*

## Leikskráin í bólki D

17/1 kl. 15.15: Noreg - Saudi Arabia
17/1 kl. 17.15: Egyptaland - Serbia
17/1 kl. 19.15: Danmark - Brasilia
18/1 kl. 15.15: Brasilia - Noreg
18/1 kl. 17.15: Saudi Arabia - Egyptaland
18/1 kl. 19.15: Serbia - Danmark
19/1 kl. 16.00: Brasilia - Serbia
19/1 kl. 18.10: Noreg - Egyptaland
19/1 kl. 20.15: Danmark - Saudi Arabia
21/1 kl. 16.00: Saudi Arabia - Brasilia
21/1 kl. 18.10: Noreg - Serbia
21/1 kl. 20.15: Egyptaland - Danmark
22/1 kl. 15.15: Serbia - Saudi Arabia
22/1 kl. 17.15: Egyptaland - Brasilia
22/1 kl. 19.15: Danmark - Noreg

**Strikuspælarin á danska hondbóltslandsliðnum, Michael V. Knudsen hevur gjørt sær sínar metingar um mótstøðuliðini hjá Danmark í innleiðandi bólkaspælinum í HM í Kroatia**

HONDBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Fríggjadagin byrjar HM í manshondbólti í Kroatia. Í hvørjum innleiðandi bólki eru 6 lið, og skulu øll liðini spæla 5 dystir í innleiðandi bólkaspælinum. Danska sjónvarpsstøðin, TV2 hevur biðið strikuspælaran á danska landsliðnum, Michael V. Knudsen um at meta um tey 5 mótstøðuliðini hjá Danmark í innleiðandi bólkaspælinum. Metingarnar hjá Michael V. Knudsen eru hesar:

### Brasilia

Talan er um eitt spennandi lið, og var nær við, at Brasilia gjørdi tað óvæntaða á olympisku leikunum í summar. Talan er um eitt lið, sum ein altíð kann fáa trupulleikar við. Men samstundis er talan um eitt lið, sum vit eiga at vinna á. Vit mugu bara syrgja fyri at byrja dystin væl, og fáa lagt sjógv millum liðini í fyrra hálvleiki. Annars kan tað gerast vandamikið fyri okkum.

### Serbia

Serbia er eitt av teimum sterkaru liðunum í okkara bólki. Liðið stríðist ótrúliga nógv, og teir eru harðligir. Í dystinum ímóti teimum mugu vit veruliga stríðast. Spælarnir úr Serbia vita, at teir skulu inn á vøllin fyri at steðga mótstøðuliðnum. Og eydnast hetta hjá teimum, so kann tað gerast rættiliga torført at sigra á teimum. Teir fara at stríðast til tann síðsta blóðsdropin. Men um vit skulu hava vónir um eitt gott HM-endaspæl, so mugu vit bara vinna á teimum.

### Saudi Arabia

Eg veit ikki nógv um Saudi Arabia – annað enn tað, at teir hava ongan møguleika í HM-endaspælinum. Hópurin hevur fingið rættiliga góð úrslit í venjingardystunum áðrenn endaspælið, men ein kann ikki døma nógv út frá venjingardystum.

### Egyptaland

Vit hava ofta spælt ímóti teimum, og vit hava nakað at hevna frá OL, tá teir tíverri sigraðu á okkum. Eins og Serbia, so eru teir eitt lið, sum stríðist nógv, og teir verða 100% klárir, tá teir fara inn til ein dyst. Zaky er ein av teimum stóru profilunum hjá teimum, men teir hava eisini aðrar spælarar, sum spæla í Evropa. Teir hava eina ógvuliga offensiva verju, og spælustílurin er nógv ørvísi, enn okkara.

### Noreg

Noreg verður tað torførasta mótstøðuliðið í bólkinum. Vit hava tað altíð torført ímóti teimum, og hvørja ferð er talan um eina uppgerð millum arvafíggindar. Teir hava eitt gott lið, serliga í verjupartinum, og so eru teir eisini kropsliga sterkir.

---

# Tjaldur bakkaði

**Tvær hálvfinalur verða spældar í Coca-Cola kappingini í kvøld. Eisini dysturin millum StÍF og Tjaldur, sum Tjaldur ætlaði at boykotta**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað fekk ilt í Tjaldur, tá Kappingarnevndin hjá HSF í gjár gjørdi av at flyta hálvfinaluna hjá kvinnunum móti StÍF frá hós- til mikukvøldið. Orsøkin til hetta var, at Tjaldur kortini ikki hevði spælt dyst mánakvøldið, soleiðis sum tær skuldu eftir skránni, men Tjaldur vildi ikki finna seg í, at dystarflyting varð gjørd við somikið stuttum varni.

- Okkara spælarar hava fingið at vita, at dysturin verður hóskvøldið, og hava lagt sær arbeiði eftir tí, og venjarin hevur gjørt venjingarnar útfrá tí, segði Niels Peter Bech úr Tjaldri.

Kappingarnevndin hevur tó at kalla óavmarkaða heimild í slíkum spurningum, og í gjárkvøldið kom fráboðan frá Tjaldri um, at tær kortini fara inn á Skála at spæla.

Hin hálvfinalan í kvøld verður hjá monnum, har Neistin og KÍF spæla í Havn.

Í morgin eru so aftur tvær hálvfinalur á skránni. Tá spæla Kyndil og StÍF hjá monnum, meðan Stjørnan og Neistin spæla hjá kvinnum.

## Dystirnir

**Menn**

| Dagur | Kl. | Dystur |
|---|---|---|
| 14.01 | 20.00 | Neistin-KÍF |
| 15.01 | 19.15 | Kyndil-StÍF |

**Kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 14.01 | 19.30 | StÍF-Tjaldur |
| 15.01 | 20.00 | Stjørnan-Neistin |